tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 28 Fríggjadagur 9. februar 1996 70. árgangur Krónur 7,00

**Bygnaðarbroytingarnar í Tinganesi:**

# Eingin veit hvat Finn Norman Christensen ger

- Hevði forstjórin í Tinganesi greitt frá sínum ætlanum, áðrenn tíðindini verða send fjølmiðlunum, høvdu vit verið spard fyri nógv, sigur skrivstovustjórin á almanna- og heilsudeildini

*síða 4*



*Vanaliga samskiftið við starvsfólkini og við fjølmiðlarnar er helst ein av størstu trupulleikunum hjá forstjóranum í Tinganesi, Finn Norman Christensen*

---

**Kvøldlot:**

## Skal missa skeinkiloyvið



*Skeinkiloyvið hjá Kvøldloti er í vanda (Savnsmynd)*

**Tað sigur loyvisnevndin, men nevndin í Kvøldloti vil vita hví, og málið endar tí í rættinum**

*síða 5*

**Nýggjar metingar vísa:**

# 1.000 fólk úr ALS í ár

- Men trýstið á arbeiðsloysisskipanina linkar ikki fyribils. Longu nú - bert góður mánaður er farin av árinum, eru yvir hundrað fólk komin í skipanina. Verður gongdin tann sama alt árið, minkar talið av fólki í skipanini ikki.

*síða 7*

## Fyrsta oljan upp ár 2004

- Og fram til ár 2020 fara tilsamans fýra stórir oljupallar ella skip at framleiða olju úr føroysku undirgrundini. Tá bretska framleiðslan verður upp á tað mesta, verða har tilsamans 9 slíkir pallar.

*síða 12*

fk
HVØNN DAG Í FEBRUAR!
Døgurði
fyri
BERT 25 kr.!
– bert galdandi, um etið verður í matstovuni –
Matstovan í Hoyvík

## Útlendsk ráðgevarafyritøka um framtíðar føroyska oljuvinnu:

# Fyrsta oljan upp í 2004

**Fyrsta oljuframleiðslan í føroyskum øki fer at byrja í ár 2004. Fram til ár 2020 fara at tilsamans fýra stórir oljupallar/skip at framleiða olju úr føroysku undirgrundini. Tá framleiðslan á bretskum øki er upp á tað mesta, verða har tilsamans 9 slíkir pallar. Hetta kunnu vit lesa í eini talvu, sum olju- og gassráðgevarafelagið MAI hevur gjørt fyri skotskar myndugleikar. Úr talvunum kunnu vit neyvt lesa, hvussu gongdin verður á bæði føroyskum og bretskum øki.**

Jan Müller

Í frágreiðingini, sum ráðgevarafelagið MAI Consultants hevur gjørt fyri myndugleikarnar í Scrabster um eina komandi oljuvinnu í nýggju oljuprovinsuni á Atlantsmótinum – økið millum Hetland og Føroyar ella eisini nevnt "The Atlantic Frontier" – verður nakað gjørt burtur úr útlitinum fyri eini oljuvinnu á føroyskum øki.

Í rættiliga nágreiniligari talvu er gjørt upp, nær byrjað verður at bora her, nær fyrsta oljan kemur upp og hvussu so útviklingurin verður osfr.

Hyggja vit nærri at talvuni kunnu vit lesa úr henni, at fyrsta oljan á føroyskum øki sær dagsins ljós í 2004. Tvey ár seinni byrjar so framleiðslan frá tí næstu oljukelduni, og í 2010 verður skruvað frá teirri triðju keldini. Tað skulu so ganga 8 ár, til framleiðslan frá tí fjórðu keldini byrjar te í 2018.

Hyggja vit so eftir gongdini í bretsku oljuvinnuni, so siggja vit, at fyrsta framleiðslan byrjar í ár. Tað er Foinaven keldan, sum fer undir framleiðslu í juni. Tað ganga so tvey ár til tann næsta oljukeldan kemur í gongd. Hetta verður Schiehallion, sum verður fyrireikað nú og sum eftir øllum at døma fer undir framleiðslu sum ásett í talvuni. So far so good.

Fylgja vit nú víðari útviklingin á bretskum øki, so fer tað at ganga slag í slag. Skruvað verður frá triðju keldini í 1999, tí fjórðu í 2001, tí fimtu í 2003 osfr.

Framleiðslan á bretskum øki er í hæddini í 2015, tá olja verður framleidd í tilsamans 9 ymsum økjum á Atlantsmótinum.

Í frágreiðingini sigur ráðgevarafyritøkan, at roknast kann við tilsamans 12 stórum framleiðslupallum í øllum økinum, tá framleiðslan er uppá tað mesta. Tvs. fýra á føroyskum øki og níggju á bretskum.

### Fyrivarni

Slíkt skal uttan iva takast við størsta fyrivarni, tí tað er gjørt út frá metingum. Enn vita vit jú ikki, um nøkur olja er á føroyskum øki, sum lønandi vinna kann fáast burtur úr. Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini sigur, at henda talvan er nýggj fyri sær og leggur hann áherðslu á, at tað mesta av hesum byggir á metingar og gitingar. Men kortini heldur hann hana verða áhugaverda, tí hvat bretska partinum viðvíkur, so er samsvar millum talvuna og gongdina, í hvussu er hvat viðvíkur komandi árunum, har bæði Foinaven og Schiehallion byrja framleiðslu.

### Stórar upphæddir

Í frágreiðingini hjá skotska ráðgevarafelagnum verður annars víst á, at stórar oljugoymslur eru á Atlantsmótinum og verður greinað út, hvussu nógv ein kann rokna við at finna á teimum ymsu leiðunum. Her siggja vit, at mesta oljan liggur goymd í "The Faeroe Basin", sum er Føroyar-Hetlandslagdin, ið bæði er á føroyskum og bretskum øki, tó mest bretsku megin miðlinjuna. Tað er kanska vert at nevna í hesum sambandi, at tað m.a. júst er hetta økið, sum bretar hava gjørt krav upp á í marknastríðnum.

Ráðgevarafelagið hevur so eisini roynt at seta krónur á útviklingin á Atlantsmótinum. Frá 1972 og til í dag eru borað 104 hol og eru brúktar 10 mia. kr. til kanningar í hesum økinum. Millum 95 og ár 2010 verður mett, at samlaðu útreiðslurnar í kanningar og oljuvinnu á Atlantsmótinum fara at verða 100 milliardir krónur.

"Faeroes region could follow similar development behind W.o.S (approx. 5 years)" stendur í frágreiðingini, tvs. at vit kunnu rokna við sama útviklingi á føroyskum øki sum vestan fyri Hetland men bert fimm ár seinni.

### Assessment of Undiscovered Oil Reserves

| Basin | Future Discoveries | Size Range | Estimated Risked Reserves (mmbbls) |
|---|---|---|---|
| Faeroe | 5-15 | 100-1000 | 2,500 |
| Solan | 1-5 | 50-500 | 500 |
| N. Shetland | 1-3 | 100-1000 | 450 |
| W. Shetland | 1-5 | 50-500 | 300 |
| W. Orkney | 1-5 | 50-500 | 150 |
| Hebridean | 0-5 | 50-500 | 100 |
| N. Rockall | 0-4 | 100-1000 | 75 |
| S. Rockall | 0-3 | 100-1000 | 50 |
| | | | |
| Risked Total | | | 4,125 |

### Atlantic Frontier- Offshore Activity, 1995-2020







Kortið, sum uttan iva eigur at takast við størsta fyrivarni, er ein meting, sum ráðgevandi fyritøkan MAI hevur gjørt. Men hetta er so fyrstu ferð, at ein komandi gongd í eini føroyskari oljuvinnu er sett á prent. Á talvuni her til at síggja metingar av útviklinginum í føroysku oljuvinnuni heilt fram til ár 2020. Martin Heinesen á Oljufyrisitingini sigur í eini viðmerking, at slík talva er bygd á metingar og eigur tí at takast við størsta varsemi. Men hann heldur hana verða áhugaverda. Tó veit hann ikki, hvat tilfar hon byggir á.